# Børn og sorg!

TÍÐINDASTUBBI

Seinastu árini hava fleiri skúlar gjørt mannagongdir í samband við andlát og miss í skúlunum.

Í hesum sambandi skipar Argja skúli fyri pallborðsfundi í Argja skúla mánakvøldið 14. mars kl 19.30 við evninum: Børn og sorg

Greitt verður frá mannagongd skúlans. Heri Joensen, prestur, nemur við evnið Sorg, Hans Mourits Foldbo, lærari og sálarfrøðingur, greiðir frá fyribrigdinum: "Inn og út úr sorgini", og heilsufrøðingar greiða frá royndum við sorgbólkum.

Høvi verður eisini at seta spurningar

# Virðislønt føroysk symfoni á fløgu



Vit kenna Sunleif Rasmussen sum tónaskald. Hann er tann fyrsti føroyingurin, sum tók útbúgving í komposisjón á Det Kgl. Danske Musikkonservatorium.

Sunleif búði í Keypmannahavn frá 1988 til 2001. Meðan hann las, skrivaði hann tónleik til kór og orkestur. Hann hevur skrivað nakað av tí mest spennandi føroyskt komponeraða kór- og orkesturtónleiki í nýggjari tíð. Tónleikurin hevur íblástur frá føroysku náttúrini og kvæðunum. Stórur partur av tónleikinum er skrivaður til kór. Hann hevur skrivað ta fyrstu føroysku symfoniina 'Oceanic Days' sum hann fekk Nordisk Råds Musikpris fyri, symfoniin bleiv framførd í Norðurlandahúsinum í Føroyum í mars 2000.

Tað er júst hendan symfoniin, ið nú er á fløgu. Nakað heilt serstakt við hesi fløgu er tað, at hon er tikin í surround. Tað er plátufelagi Dacapo Records, ið hevur givið út.

Mikudagin 16. mars, kl. 15.00 verður almenn móttøka í Klingruni í Norðurlandahúsinum, har ið greitt verður frá fløguni og eisini verður høvi at hoyra Sunleif. Tá fyrsti partu av móttøkuni hevur verið, verður høvi hjá áhoyrarum at tosa við Sunleif og onnur um fløguna.




## Hvussu fáa vit ferðafólk at surfa til Føroya?

**Evnisdagur á Hotel Føroyum 8. apríl um marknaðarføring á internetinum – við serligum atliti at ferðavinnuni**

Fyrilestur og kjak verður um hesi evni:

Tey nýskapandi vinna á teimum siðbundnu.
Hvussu kann føroyska ferðavinnan nýta internetið á besta hátt?
- Jónsvein Joensen, KT-ráðgevi á teldufyritøkuni Kervi

Heimasíðan – eitt tvíeggja svørð.
Heimasíðan er neyðug. Men ein vánalig heimasíða kann styggja kundarnar.
- Jacob Hancke, ráðgevi hjá SignalDigital

Tann prentaði faldarin í teldutíðini.
Internetið tekur ikki lívið av faldaranum – men faldarin má brúkast rætt.
- Walther Jensen, ráðgevi innan ferðafólkavinnuna

Hvussu marknaðarførir tú marknaðarføringina?
Ein heimasíða er góð til marknaðarføring. Men hon skal eisini sjálv marknaðarførast.
- Høgni Rasmussen, stjóri á Sansum

Nýggi vevmátarin hjá Gallup.
Álítandi hagtøl til eigarar og viðskiftafólk.
- Ellintur Egilstrøð, stjóri á Gallup Føroyar

Hevur tú áhuga fyri heimasíðum? Hevur tú áhuga fyri ferðavinnu?
Hevur tú áhuga fyri marknaðarføring? – So er temadagurin fyri teg.

Kostnaðurin er einans 425 krónur – og tá er stórt kalt borð íroknað.
Tilmeldingin fer fram á heimasíðuni hjá ferðaráðnum: www.tourist.fo

sansir.fo

ATLANTIC AIRWAYS Ferðaráð Føroya www.tourist.fo Hotel Føroyar



# Havnar Bio

kall Coca-Cola




**Hitch** FRUMSÝNING

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 11.03 | kl. 18.30 | kl. 21.00 | kl. 23.30 |
| Leygardag | 12.03 | kl. 18.30 | kl. 21.00 | kl. 23.30 |
| Sunnudag | 13.03 | kl. 19.30 | kl. 22.00 | |




**Forbandelsen**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 11.03 | kl. 23.00 |
| Leygardag | 12.03 | kl. 23.00 |
| Sunnudag | 13.03 | kl. 22.30 |




**Constantine**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 11.03 | kl. 20.30 |
| Leygardag | 12.03 | kl. 20.30 |
| Sunnudag | 13.03 | kl. 20.00 |




**Robotter** UNDANFRUMSÝNING

| | | |
|---|---|---|
| Leygardag | 12.03 | kl. 16.30 |
| Sunnudag | 13.03 | kl. 17.30 |




**Peter Plys og Hafferlaffen**

| | | |
|---|---|---|
| Leygardag | 12.03 | kl. 17.00 |
| Sunnudag | 13.03 | kl. 18.00 |

KOMANDI FILMUR:




**The Ring Two** FRUMSÝNING

Fríggjadag 18.03

www.bio.fo • Telefon 31 19 56

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu